## Jens Martin um trúgv

- Eg eri uppvaksin við, at trúgv er ein persónligur heimur. Tað rákið er broytt nú, og vit síggja meira um Bíbliur og annað. Eg havi meira virðing fyri Bíbliuni enn einum vanligum vikublaði. Eg vil siga, at eg eri moderatur trúgvandi. Tá ið alt kemur til alt, so er tað ein støða millum teg og Gud.



## Jens Martin um hondbólt

- Eg havi spælt hondbólt. Eg gjørdi eisini fimleik, og í veruleikanum dámdi mær nógv betri hondbólt og fimleik enn fótbólt, og eg fekk tilboð frá Kolding at koma at spæla hondbólt við teimum. Hondbóltssambandið datt tó niðurfyri í 1989, og tá vóru ikki so nógvar avbjóðingar. Samstundis hendi nógv innan fótbóltin, og soleiðis valdi tótbólturin valdi seg sjálvan.

# til topphúgvuna




*- Eg spæli so leingi, sum eg havi hug, og eg eri førur. Eg havi enn øgiliga góðan hug til at spæla, sigur 39 ára gamli Jens Martin Knudsen, sum fer at spæla aftur í ár*

í ætlanini at gera innaduravøll í Skálafirði. Umframt alt hetta, venur hann ungar málverjar kring alt landið. Jens Martin heldur eisini, at venjarayrkið er ein gongd leið, tá ið hann verður liðugur sum virkin fótbóltsleikari.

– Eg havi tikið neyðugu skeiðini í Føroyum, og eg kundi heilt vist hugsað mær at verið venjari. Tað kann tað sama vera næsta ár sum okkurt annað ár, sigur hann.

### Nógvir góðir ungir málverjar

Jens Martin venur málverjar kring alt landið, og hann sær sera nógvar evnaríkar malverjar kring landið. Tað eru nógvir útlendskir málverjar í Føroyum. Tó heldur Jens Martin ikki, at teir eru betri enn teir føroysku.

– Tendensurin við útlendskum málverjum er kendur eisini í londunum rundan um okkum. Vit halda, at fremandir málverjar eru betri, hóast veruleikin ofta ikki er so. Eg haldi, at støðið á málverjum í Føroyum er nógv hægri, enn støðið á útileikarum, sigur Jens Martin.

– Tað eru fleiri ungir evnaríkir málverjar, sum vit skulu halda eyga við. Eg vil ikki nevna nøkur nøvn, men málverjarnir hjá U-19 og U-21 landsliðnum eru ótrúliga góðir. Framtíðin við føroyskum málverjum sær góð út, sigur Jens Martin Knudsen at enda.

skaðin ikki forðaði mær, sigur Jens Martin.

### Ætlar ikki at gevast enn

Jens Martin er ein partur av hópinum hjá NSÍ aftur í ár, og hann hevur enn ikki nakrar ætlanir um at gevast.

- Eg spæli so leingi, sum eg havi hug, og eg eri førur. Eg havi enn øgiliga góðan hug til at spæla. Vit hava eisini gjørt nakrar likamligar royndir, og eg havi heilt góð tøl at vísa á, sigur Jens Martin, sum tó ásannar, at tað er ikki eins lætt, sum tá ið hann var ungur.

– Eg havi konu og børn, og um tey ikki vóru so tolin, so hevði tað ongantíð borið til. Eg skal eisini venja eyka nú fyri at kunna fylgja við hinum, sigur hann, sum eisini fæst við mangt annað enn at spæla fótbólt.

Hann er ítróttarvenjari í skúlanum í Runavík. Eisini er hann við

## Fakta

### Jens Martin Knudsen

Føddur 11.06.67
Giftur við Maibritt
Eiga 4 børn saman
Spældi fyrstu ferð á besta liðið í 1983 sum 16 ára gamal